# Lastbilastevna í Runavík

**Leygardagin 19. juli 2003 verður skipað fyri stórari lastbilastevnu á havnaøkinum í Runavík. Tað er Leif Eliasen í Klaksvík sum samskipar tiltakið. Hetta verður fyrsta stevna av sínum slagi í Føroyum**




*Leif Eliasen í Klaksvík samskipar lastbilastevnuna í Runavík*

LASTBILASTEVNA
*Magnus Gunnarsson*

Stór lastbilastevna verður í Runavík leygardagin 19. juli 2003. Tað er 24 ára gamli klaksvíkingurin Leif Eliasen, sum er samskipari av tiltakinum. Hann arbeiðir dagliga sum lastbilaførari hjá Elmar Zachariasen í Klaksvík. Hóast lastbilastevnur ella Trucker festivalar sum tað eisini verður nevnt aðrastaðni, eru vanlig tiltøk í øðrum londum, er hetta tó fyrstu ferð, at slíkt tiltak verður fyriskipað í Føroyum. Leif Eliasen sigur, at hann hevur fingið hugskotið á túrum, hann hevur verið í Evropa eftir lastbilum fyri fyritøkuna, sum hann arbeiðir hjá og á lastbilastevnum í Danmark. Endamálið við hesi stevnuni er, at lastbilaførarar, sum bert møtast og heilsa upp á hvønn annan í ferðsluni, nú kunnu møtast og hugna sær saman og tosa um felags áhugamál, meðan bilarnir verða sýndir fram.

Leif vónar at nógvir lastbilaeigarar tekna seg til stevnuna. Tað eru sum so ongar treytir, allir bilar kunnu vera við, lastbilar, trailarar, fiskabilar, skrellibilar o.s.fr. Men hann væntar at bilarnir, ið koma til stevnuna, eru reinir og snøggir. Bilarnir eru góð reklama fyri teirra egnu fyritøkur. Møguliga verða motorsúkklur eisini við á stevnuni, men støða er ikki tikin til tað enn. Stevnan verður á havnaøkinum í Runavík. Áhugaði kunnu tekna seg áðrenn 6. juli hjá Leif Eliasen tel. 225253 ella teltupost: leif@ez.fo


Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

*Rachel Biskopstø*
fødd Hansen
Klaksvík

doyði og fór til gravar. Tøkk til prestin, kirkjutænarar og sangarar. Tøkk til starvsfólkini í Niðri stovn og øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Hjartans tøkk øll somul.

Fyri tey avvarðandi
*Børnini*



**Rover 620 2,0 SI 131 hk**



Árg. sept. 2000, bert koyrt 12.300 km. Bilurin hevur aircondition, alufelgur, fjarstýrt sentrallás, elsíðuspegl v. hita, CD-anlegg v.m.
**Prísur: kr. 180.000**

**P/f D.B. Bilar**
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 Fax 310650



TYRLUTÆNASTAN
HJÁ ATLANTIC AIRWAYS



## Tyrluflúgvingin á hvítusunnu 2003

2. hvítusunnudag verður flogið sum sunnudag.
Sunnudagin 8. juni verður ikki flogið.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 00 · Fax 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo
www.atlantic.fo





## Bilførari

Vit søknast eftir einum bilførara við stórum koyrikorti og kranaloyvi at byrja sum skjótast.

Starvið sum bilførari fevnir um útkoyring av byggitilfari í samráð við goymsluformann okkara.

Trukkloyvi gevur fyrimun, men er ikki ein treyt.

**Vit vænta at tú:**
- ert nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í hesum starvi og kanst liva upp til omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn.

**Umsóknin skal sendast til:**
Timburhandilin
att.: Jan á Argjum
Postmoga 3038
110 Tórshavn

*Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Jan á Argjum á tlf. 31 12 50*

TIMBUR HT HANDILIN
Tórshavn: Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
Sandur: Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • Kambsdalur: Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
www.timburhandilin.fo




Áskoðaravegleiðing

# Føroyar - Týskland

## 11. juni 2003 kl. 19.45

Dyrnar lata upp í seinasta lagi kl. 18.00. Fólk vera biðin um at møta í góðari tíð. Tá ið dysturin er byrjaður, verða dyrnar stongdar.

Umframt at alt viðføri verður kannað, verða allir áskoðarar kropskannaðir við inngongdina. Tað er sjálvboði hjá fólki at lata seg kropskanna, men fólk sum nokta at lata seg kropskanna sleppa ikki inn.

Tað er tí umráðandi, at fólk ikki taka lutir við, sum ikki eru loyvdir at hava inn við, so sum: rúsdrekka, fløskur, ljóðhorn, fýrverk, stengur, flog við stong og tílíkt.

Slíkir lutir verða tiknir frá fólki og lagdir uttanfyri, fyri ábyrgd eigarans.




TÓRSVØLLUR